# Reingerðarfólk
## til býráðshúsini hjá Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar kommuna søkir eftir fólki at vaska býráðshúsini, frá 01. november 2003 at rokna.

Arbeiðið er mett til uml. 15 tímar um vikuna og arbeiðstíðin verður gerandisdagar millum kl. 16,00 og 19,00.
Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknarfreistin er 15. oktober 2003, og skal sendast til:

**Fuglafjarðar kommuna**
Postbox 30
530 Fuglafjørður

# Bilur til sølu

BMW 524 td, nýsýnaður, koyrt 282.000 km, frá nov. '90, til sølu fyri 85.000 kr.
Bilurin er at síggja hjá Sp/f Ivan Johansen bilasølu.

**Tlf. 311199 / 503108**

**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29

# Lærlingur

**søkist til handilin hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali at seta skjótast gjørligt.**

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt gott arbeiðspláss, har tú í einum spennandi starvi fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Fjølbroyttar uppgávur, sum gera at tú fert at læra nógv og skjótt

**Tú kemur at taka tær av at:**
- Taka ímóti og avgreiða viðskiftafólk, sum kemur í handilin ella gjøgnum telefon
- Samskifta við og bíleggja vørur frá veitarum okkara uttanlands
- Taka móti innkomnari vøru frá veitarum okkara og halda skil á eykalutagoymslu

**Vit vænta okkum av tær, at:**
- Tú ert ágrýtin, fryntlig/ur og fyrikomandi
- Tú ert álitandi og før/ur at átaka tær ábyrgd

**Førleika- og útbúgvingarkrav:**
- FHS ella onnur miðnámsútbúgving

**Umsókn verður at senda til:**
P/F Esmar Simonsen,
Att. Jonni Isaksen, Kambsdalur,
530-Fuglafjørður.

*P/F Esmar Simonsen er ein handils- og tænastufyritøka, sum hevur sølu- og verkstaðsvirksemi innan bilar og trukkar. Vit umboða merkini Daewoo, Still, Caterpillar og nógv onnur merki. Harumframt hava vit ein handil, har m.a. bil-eykalutir og dekk verða seld. Í fyritøkuni starvast 13 fólk.*

# Kvøldskúlin í Norðskála-Oyrar skúla

Kórið undir leiðslu av Hans Oliver Joensen byrjar venjingina aftur mánakvøldið 6. oktober 2003 kl. 19.00. Vant verður í Skálanum.
Nýggir sangarar eru vælkomnir.

**Norðskála-Oyrar skúli**
400 Oyrarbakki
tlf. 422245

# Høll til sølu

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2002 um alment útboð av kommunalari fastogn, lýsir Sumbiar Kommuna høllina, sum stendur á havnarlagnum í Lopra, til sølu.

Høllin er 1275 fermetrar stór.

Upplýsingar um søluna fáast við at venda sær til Sumbiar Kommunu.

Møgulig tilboð um keyp skulu vera skrivlig og vera Sumbiar Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2003.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja ímillum innkomnu tilboðini ella havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. 370344 · 221915
Fax 370114

# JPS maskinverkstaður

**Vit átaka okkum –**
- Alt smiðjuvirksemi
- Motorumvælingar
- Stálarbeiði / sveising
- Hita & sanitet



**Sp/f JPS maskinverkstaður**
**FO-627 Lamba**
**Sjúrður: tel 217513 / 447513**
**Jákup Petur: tel 221755**

Sosialurin 341800

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekniakri

## Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Berlingo vøruvognur

8 mðr. gamal Berlingu HDI vøruvognur til sølu.

**Tlf. 210298**

# Barnaheimið søkir eftir avloysara

Barnaheimið søkir við hesum eftir avloysara fyri starvsfólk á Familjuheiminum, sum fer í farloyvi í eitt ár frá 01. november 2003.

Tann, sum settur verður í avloysarastarvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjuheiminum, har tilsamans 9 fólk eru í starvi. Øll við viðkomadi útbúgving.

Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiði á, hvørjar styrkir og hvørjar trupulleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er bestur og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

Hevur tú viðkomandi útbúgving og hug at royna teg í hesum arbeiði, so send umsókn sum skjótast til **Føroya Barnaheim, Pedda við Steingøtu 10, 100 Tórshavn.**

Er okkurt, tú ynskir at frætta nærri um, so ber til at ringja í vanligari arbeiðstíð á tlf. 312320 og spyrja eftir Hallbjørg Lamhauge, deildarleiðara.

Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. oktober 2003.

Tann, sum settur verður í avloysarastarvið, skal byrja 1. november 2003 ella so skjótt tilber.

**Føroya Barnaheim**

# Starvslýsing

Søkt verður eftir heilsuassistenti til fast starv at byrja 1. desember 2003. Setanarbrøk 0,59. Starvið umfatar dag-, kvøld- og náttarvaktir.

Løn sambært Fíggjarmálaráðnum og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til leiðaran á tlf. 456775.

Umsókn við avriti av prógvi og góðkenning skal sendast til:

**Norðoya Ellis- og Vistarheim**
Garðavegur 10
FO-700 Klaksvík
Att. Leiðarin

Umsóknarfreist: 13. oktober.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Skotska vikan**
Í hesi vikuni er skotsk handils- og mentanarvika í Havn. Í hesum sambandi eru m.a. limir í býráðnum í Aberdeen á vitjan. Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu og John Reynolds, Lord Provost of the City of Aberdeen settu "Skotsku vikuna" í SMS týsdagin.

www.torshavn.fo

# Skotskur matur og skotskur tónleikur

Í sambandi við skotsku vikuna verða hesi tiltøk í vikuskiftinum:

**Skotski kokkurin Ian Simpson**
vitjar Merlot fríggjakvøldið og leygarkvøldið og borðreiðir við skotskum mati.

**Banish Misfortune spæla:**
- í SMS leygardagin kl. 13.00
- í miðbýnum leygardagin kl.11.00
- í Vertshúsinum fríggjakvøldið kl. 22.00, leygarkvøldið Kl. 22.00 og sunnukvøldið kl. 21.00

**DJ David Craig**
- hevur diskotek í Platform fríggjakvøldið og leygarkvøldið.
- hevur skotskt barnadiskotek á Platform sunnudagin kl. 19.00-22.00

# Eftirlýsing eftir myndum til myndaframsýning á Ráðstevnuni tann 10. - 11. oktober 2003



Vit sóknast eftir myndum,
Nýggjum sum gomlum, ið lýsa Heilsuverkið í Føroyum!

Alt hevur áhuga!

Myndirnar skulu sendast til:

Sosialurin 341800

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Att.: Søgubólkurin · Lucas Debesargøta 14
Postsmoga 1285 · 110 Tórshavn

CATERPILLAR

**442D RENNUGRAVARI**
**Fabriksnýggjur**
**Prísur uttan mvg. Kr. 498.000,-**



HYDREMA

**908ESD RENNUGRAVARI**
**Frá 1996 – 5750 tímar-renoverað**
**Prísur uttan mvg. Kr. 450.000,-**



**906B RENNUGRAVARI**
**Frá 1991 – 3800 tímar-renoverað**
**Prísur uttan mvg. Kr. 305.000,-**

**P/F ALMA**
***Maskinverkstaður & Smiðja***
Tlf. 31 58 90 Fax. 31 35 00
Mail: jan@alma.fo

# Ergoterapeutur/Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er 1 fyribilsstarv leys at seta beinanvegin.

1 avloysararastarv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur fyri starvfólk í barsilsfarloyvi er leyst at seta pr. 01. nov. 2003.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 13 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði er ein fyrimunur
- góð samstarvsevnir
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og viðmerking um hvat starv søkt verður um skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 17. okt. 2003 kl. 14.00.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Frítíðarskúlin í Stoffalág 60**
Í frítíðarskúlanum ganga 52 børn, 21 fyrrapartin og 31 seinnapartin

www.torshavn.fo

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Frítíðarskúlan í Stoffalág 60 eftir:**
einum pedagogi/hjálparfólki 20 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er seinnapart frá kl. 12.00 - 16.00 og frá kl. 13.00 - 17.00.
Fólkið verður sett 1. november 2003. Starvið er tíðaravmarkað til 30. juni 2004. Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 22. oktober 2003.

Leiðari Maria Heinesen, 314364
Stoffalág 60
Box 3316 FO 100 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.